VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og suðri og ælingur, men eisini onkur sólglotti. Hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið leygardagin:
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og útnyrðingi, um kvøldið minni vindur. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin upp í andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig. Týsdagin upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Lýggjari.

Nýggjur skraddara-verkstaður í Havn

Havnarkvinnurnar, Beinta Vilhelmsen og Sólvør Jacobsen, eru farnar undir egi skraddaravirksemi í høvuðsstaðnum. Tær siga seg gera alt frá vanligum umvælingum til at skapa nýggj pløgg til teir meira kræsnu kundarnar

Havnarkvinnurnar, Beinta Vilhelmsen og Sólvør Jacobsen, hava fingið egnan skraddaraverkstað í Havn. Báðar hava lokið útbúgving sum skraddarar í Danmark, og hava arbeitt við hugskotinum um ein skraddaraverkstað í eina tíð.
Mynd: Jens Kristian Vang

SKRADDARAR
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Ungu havnarkvinnurnar, Sólvør Jacobsen og Beinta Vilhelmsen, fóru fyri góðum tveimum mánaðum síðan undir egi skraddaravirksemi í Havn. Bæði Beinta og Sólvør hava lokið útbúgving sum skraddarar í Danmark, og tær hava í eina tíð arbeitt við hugskotinum um lata upp ein skraddaraverksstað í Havn. Fyri góðum mánaði síðan eydnaðist teimum at finna eini høli í Eysturbýnum, og síðan hava havnarkvinnurnar tikið ímóti bíleggingum frá fólki.

–Vit gera alt frá vanligum umvælingum til at skapa nýggj pløgg, har kundin sjálvur setur ynski fram, hvat hann vil hava. Pløggini, vit skapa, eru ikki ætlað sum nøkur hópframleiðsla, men tvørturímóti leggja vit okkum eftir at gera serlig klæðir. Fólk fáa tað, tey biðja um, og ein fær júst tað ein rindar fyri, siga tær báðar Sólvør Jacobsen og Beinta Vilhelmsen.

Nýggju skraddarnir í høvuðsstaðnum hava havt úr at gera, síðan tær byrjaðu fyri tveimum mánaðum síðan. Í samband við søluframsýningina í Müllers Pakkhús herfyri, fingu tær ein hópin av bíleggingum, og síðan hava havnarkvinnurnar hava nógv at gera.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷14
Nuuk	÷2
Qaqortoq	÷2
Ammassalik	÷4
Saint John's	6
Halifax	4
Reykjavík	÷3
Seyðisfjørður	3
Tórshavn	7
Lerwick	9
Aberdeen	6
London	8
Tromsø	2
Bergen	10
Oslo	–
Stokkhólm	4
Keypmannah.	8
Helsinki	2
Moskva	1
Berlin	11
Warzawa	10
Kiev	3
Bukarest	6
Paris	9
Madrid	8
Róm	17
Malorca	16
Athen	17
Malta	17
Tunis	16
Beijing	0
New Dehli	22
Bangkok	33
Jakarta	31
Sydney	–
New York	7
Miami	26
Los Angeles	15
Meksikobýur	–
Panama	–
La Paz	17
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	29

LUFTTRÝSTIÐ

Eitt lágtrýst, 973 hPa. við Føroyar fer norðureftir. Eitt annað lágtrýst, 994 hPa. í útsynning úr Íslandi fer eystureftir.



Lágtrýstið í landnyrðing úr Íslandi fer norðureftir. Lágtrýstið við Skotland kemur móti Føroyum og fer síðani í landnyrðing.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 26/11 kl. 06⁰⁰– 27/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,8°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 14,0 mm – mált frá 26/11 kl. 06⁰⁰–27/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 130,8 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

VESTFALLSKYRRINDI

23. november: Tendring/Mánin næstur jørðini
30. november: Fyrra kvarter
7. desember: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
28. nov	10.20	22.48	09.20	21.48	09.35	22.03	—	12.20	00.53	13.20	08.35	21.03	07.35	20.03	10.35	23.03	11.35	—	10.05	22.33	11.20	23.48
29. nov	11.13	23.38	10.13	22.38	10.28	22.53	00.48	13.13	01.48	14.13	09.28	21.53	08.28	20.53	11.28	23.53	00.03	12.28	10.58	23.23	—	12.13
30. nov	—	12.15	11.15	23.52	11.30	—	01.38	14.15	02.38	15.15	10.30	23.07	09.30	22.07	—	12.30	00.53	13.30	—	12.00	00.38	13.15
1. des	00.52	13.27	—	12.27	00.07	12.42	02.52	15.27	03.52	16.27	11.42	—	10.42	23.17	01.07	13.42	02.07	14.42	00.37	13.12	01.52	14.27

5 707265 100050 >